# INGERÐ VALDI



*Ingerð Klein Olsen vitjar heima í Vestmanna o.u. annað hvørt ár*
Mynd: Jens Kristian Vang

**KARRIERA Ingerð Klein Olsen úr Vestmanna er komin so langt sum til ber á starvsleið síni sum skipsførari. Í heyst fer hon í nýtt starv og skal føra stóra rundferðarskipið Queen Victoria**

Randi Jacobsen

Tá ið Norrøna kom til Føroya fyri viku síðan, var Ingerð Klein Olsen við.

Norrøna, sum vit halda vera eitt stórt skip, er eitt lítið skip samanborið við skipini, sum hon siglir við.

43 ára gamla Ingerð Klein Olsen býr í Danmark og er bara komin heim at vitja foreldrini í Vestmanna.

20. august fer hon umborð á MS Queen Victoria í seks vikur fyri at læra tað skipið nærri at kenna, og í november tekur hon við sum kapteynur á tí skipinum. Tað verður yviri í Karibia.

– Mær hevur altíð dámt tað fría lívið. Eg helt tað vera spennandi at koma umborð á skip og sleppa út í verðina. Men tá eg fyrstu ferð fór út at sigla, hevði eg ongar ambisjónir um at blíva til tað, sum eg eri í dag, sigur Ingerð.

16 ára gomul fór hon umborð á farmaskipið Blik, sum hon í eitt ár sigldi við sum stevardur, og tá fekk hon blóð upp á tonnina.

Hon søkti til DFDS og slapp inn í reiðaríið sum stýrimansnæmingur. Í 1994 tók hon prógv sum skipsførari og helt fram við at sigla við skipunum hjá DFDS.

## Fór víðari

– Tað vóru fraktskip, og eg fekk nóg mikið av at sigla í tí buldruta veðrinum í Norðsjónum, sigur Ingerð.

Hon fór tí í 1997 at kanna møguleikarnar fyri at fáa okkurt annað arbeiði, og eitt, tvey trý fekk hon starv hjá stóra bretska reiðaríinum Cunard í Southampton. Tað er reiðaríið, sum eigur Queen-skipini.

Tað gekk bara ein vika, til hon mynstraði í Keypmannahavn við stóra skipinum rundferðarskipinum Vistafjord.

– Tað var sum at koma í eina heilt aðra verð. Ferðafólkini vóru ríkfólk, og vit sigldu runt í heiminum. Umleið 1000 starvsfólk vóru umborð.

Ingerð mynstraði sum 2. stýrimaður, og nakrar mánaðir seinni varð hon flutt upp til at vera 1. stýrimaður.

Hon treivst so væl, at hon ongan hug hevði at venda aftur til DFDS, sum hon hevði farloyvi frá, og tí segði hon upp hjá DFDS.

## Royndirnar taldu

Ingerð heldur, at tað gekk so væl hjá henni at fáa nýtt arbeiði, tí hjá DFDS hevði hon drúgvar roynir við trygd umborð á ferðafólkaskipum, og hon hevði verið við til at læra fólk upp í trygd.

Í skipsvinnuni henda javnan samanleggingar, og reiðaríið Carnival Cruise Lines yvirtók Cunard. Tað gav Ingerð møguleikan at royna seg umborð á leiri øðrum skipum.

Í 2003 varð hon flutt upp til at vera staff kapteynur á seks stjørnaða rundferðarskipinum Seabourn Pride.

– Ein staff kapteynur er at kalla ein varakapteynur, sum hevur ábyrgdina av trygdini umborð, og bæði kapteynurin og staff kapteynurin eru á brúnni, tá ið skipið leggur at og fer frá.

Ingerð stóð fyri arbeiðinum at byggja stóra rundferðarskipið Aqura í Italia, har hon í tí sambandi búði í eitt hálvt ár.

– Tað var sera áhugavert, og nógv var at halda eyga við.

## Royndi átta til fimm arbeiðsdag

Í eitt ár arbeidi hon á skrivstovuni hjá reiðaríinum í